


***Nr. 1*** ***10. januar 2021*** ***81. árg.***

# Statt stinnur á tínari sannføring – og Gud vil æra teg

*„Eg havi gjørt Harranum lyfti, og eg kann ikki taka tað aftur.“*
*Dóm. 11,35 V.D.*

Í mánaðir vandi Eric Liddell av heilum huga, avgjørdur í at vinna 100 metra renningina á OL í 1924. Flestu ítróttartíðindafólkini mettu, at hann fór at vinna. Men tá ið hann kom, gjørdist hann greiður um, at renningin skuldi fara fram ein sunnudag. Hetta var ein stórur trupulleiki fyri hann, tí hann helt ikki, at hann kundi æra Gud, um hann fór at renna á Hansara heilaga degi. Hann gav avboð, og viðhaldsfólk hansara vóru skelkað.

Summi, sum fyrr høvdu róst honum til skýggja, kallaðu hann nú ein stóran tápuling. Stórt trýst varð lagt á hann, men hann stóð stinnur og var ikki at vika.

So var tað ein rennari, sum gav avboð til rennikappingina um 400 metrar. Henda renningin skuldi fara fram ein gerandisdag, og teir bjóðaðu Liddell plássið. Hetta var í veruleikanum ikki hansara vegalongd. Hesin teinurin var fýra ferðir so langur sum tann, hann so íðin hevði vant. Kortini rann hann um málstrikuna sum vinnari og setti harumframt eitt nýtt met uppá 47,6 sek. Hann vann gull á OL og vísti, at hann vikaðist ikki frá tí, hann helt vera rætt, tá ið tað ráddi um trúgv sína, og hansara søga varð seinni endurgivin í tí virðislønta filminum „Chariots of Fire“.

Eric Liddell bleiv uppaftur kendari, tá ið hann gjørdist trúboðari í Kina, har hann seinni doyði í einari krígsfangalegu í

1945. Hann var sum Jefta, sum segði: „Eg havi givið Harranum eitt lyfti, og eg kann ikki taka orð míni aftur.“ Dóm. 11,35.

Boðskapurin, sum skínur so bjartur gjøgnum lívið hjá hesum manni, er: Statt stinnur á tí, sum tú ert sannførdur um er rætt – og Gud vil sýna tær æru.

*„… et Ord til Dagen“ - Effie Campbell* umsetti.

# Lat teg ikki villleiða

Marie Kaasa hevði samrøðu við eina konu á Kanal 10. Konan greiddi frá lívi sínum. Sum ung fór hon til Oslo, og har kom hon saman við ringum vinum. Hon fall fyri rúsevnum og kom eisini inn í tað, sum verður nevnt New Age, eitt nú tað okkulta, alternativa og spiritismu.

Hon vildi sleppa burtur úr øllum hesum, tí hetta var eitt vánalív. So fór hon til avvenjingar á Evangeliesenteret. Har bleiv hon frelst og fullkomiliga loyst. Onkur gav henni eina bók. Har las hon, hvussu vandamikið hetta okkulta var, og ein trúgvandi mátti halda seg langt burur frá slíkum.

Fleiri aðrar konur, sum eisini vóru til avvenjingar og høvdu gingið í sama umhvørvi, sótu ein dagin og prátaðu, og tær hildu, at tú kundi saktans vera trúgvandi, sjálvt um tú fekst við astrologi. So funnu tær uppá at brúka Taara kort og eitt glas at seta á bretti við bókstøvum og tølum. Henda konan, sum tosaði á Kanal 10, helt, at hetta kundi einki ónt gera sær, tí hon hevði tikið ímóti Jesusi, og hann búðu í hjarta hennara.

Men tá tær fóru undir hetta, fingu allar ein skelk og gjørdust ræðsluslignar, tí veruleikin er, at tá kallar tú á andaverðina og letur upp fyri henni. Tær vóru so skelkaðar av hesi uppliving, at tær fóru undir at biðja. Tær bóðu Jesus vísa sær, um ein trúgvandi kundi fáast við slíkt. So tóku tær eitt mannakorn. Har stóð: „Tí at sjálvur Satan tekur á seg mynd sum ein ljóseingil.“ 2. Kor. 11,14. So tóku tær eitt mannakorn afturat. Har stóð: „Gud hevur havt tol við óvitandi menniskjum í langa tíð, men nú boðar hann øllum, at tey skulu venda um.“ Áps. 17,30 NS.

Tá skiltu tær, at tú kanst ikki blanda alt upp í sambandið við Jesus. Tað er hann, sum er vegurin, sannleikin og lívið. Tá ið tú tekur ímóti honum í trúgv og bjóðar honum inn í hjartað, so gongur tú á vegnum, sum førir til Himmals. Hann er sannleikin. Alt, sum umfatar New Age eru villeiðandi lygnir

frá Satani, sum vísir seg sum ein ljóseingil. Jesus er lívið við stóra L.

Henda konan vildi, at Jesus skuldi eiga seg 100%, so hon kvetti eisini við joga og mindfulness, tí tað setti hon í samband við buddismu. Ja, sanniliga: verið varin, verið vakin.

*Effie Campbell.*

# Mongum leingist eftir onkrum meira

*Gunnar Jeppestøl*

Spyrst tú fólk her á landi um innihaldið í evangeliinum, fært tú sum oftast eitt svar, ið er merkt av lógartrældómi. Í Efesarbrævinum kapittul 2,3–9 greiðir Paulus frá innihaldinum í tí nýggja lívinum, vit hava fingið í Kristusi. Evangeliið vísir okkum, at vit eru frelst av náði, og at Gud hevur givið okkum lívið sum gávu.

Sakeus var ríkur, men fátækur í sál síni. Hann átti nógvan pening og hevði gott starv, men hann livdi bara fyri tí materiella. Hann hevði hoyrt graml um Jesus og royndi at sleppa at síggja hann. Á sama hátt eru tað mong menniskju her á landi í dag, sum eru móð av tí materiella, og teimum leingist eftir onkrum meir.

Bíblian sigur, at Menniskjusonurin kom at leita upp og frelsa tað, sum var glatað. Tey, sum møttu Jesusi, fingu eina himmalska løtu, sum broytti tey restina av lívinum. Men kann tað vera, at mannamúgvan eisini í dag læsir fyri útsýninum hjá langtandi sálum, sum leita eftir Jesusi, soleiðis sum tað var í hesum førinum við Sakeusi?

Evangeliið er fyri øll. Gud vil, at eingin skal glatast, men hava ævigt lív í Jesusi. Mong fólk hava ein longsul eftir at hoyra um Jesus. Jesus steðgaði á og hugdi upp á Sakeus. Sakeus møtti eygnabrái Jesusar, sum segði navn hansara. Har og tá upplivdi Sakeus ta himmalsku løtuna.

Bíblian sigur, at hann steig niður úr trænum og tók ímóti Jesusi við gleði í hjarta sínum. Gleði spyrst altíð burturúr, tá ið himmalin og jørðin møtast. Sakeus gjørdist ein nýggjur skapningur. Hjartað umbroyttist. Jesus er Guds gáva til okkum øll, og henda gávan er ókeypis. Hevur tú tikið ímóti Guds gávu?

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein hjartanemandi vitnisburður frá einum pápa í Føroyum

Í blaðnum hjá Mosesi Hansen stendur at lesa hetta rørandi stykkið:

Dóttir henda pápan doyði 6 ára gomul av leukæmi, blóðkrabba. Stutt áðrenn hon doyði, spurdi hon pápa sín: *„Pápi, hvussu finni eg heim til Jesus, tá ið eg doyggi?“*

Pápin las frásøgnina úr Lukas kap. 16, har tað stendur í vers 22: *„So bar á, at hin fátæki doyði, og hann varð av einglunum borin í fang Ábrahams.“*

So svarið, hann gav dóttur síni, var: *„Einglarnir fara at bera teg heim til Gud!“*

*„Á, sum tað er gott,“* svaraði dóttirin. *„So er tað eingin trupulleiki!“*

Stutt eftir var familjan savnað um songina hjá dóttrini.

Hon spurdi: *„Hví eru so nógvir læknar komnir saman her í stovuni? Teir eru allir so fínir í hvítum klæðum.“*

Pápin svaraði: *„Her eru eingir læknar. Tað eru bara vit.“*

Dóttirin teskaði síni síðstu orð: *„Jú, her eru nógvir fínir, hvítir læknar. Teir standa eisini aftan fyri gardinurnar.“* Síðani dró hon sín síðsta andadrátt á hesi jørð.

Eg fari at loyva mær at broyta tekstin úr Luk. 16,22 til hetta: *„So doyði hin lítla gentan, og hon varð av einglunum borin í fang Ábrahams.“*

Eg græt, tá ið eg hoyrdi hesa frásøgn. Else Käs hevur skrivað hesa frásøgn, og so kann eg leggja afturat, at smágentan æt Henny og var av Eiði.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið**

**ynskir øllum eitt**

**av Harranum signað nýggjár**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 10. jan. | Tekstur: | Joh. 20,30-31; 21,25 og Sl. 119,9+26b+27+105+130. | bíbliuorð: Sl. 119,105. |
| 17. jan. | Tekstur: | Róm. 15,4 og 2. Tim. 3,16-17 og Jóh. 3,16. | bíbliuorð: Luk. 21,33. |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 2* *24. januar 2021* *81. árg.*

# Jesu blóð

*„…blóðið… veitir sáttargerð fyri sálir tykkara.“* 3. Mós. 17,11.

Jeffrey Ebert sigur: „Tá ið eg var fimm ár, vóru bilaverksmiðurnar enn ikki farnar at seta trygdarbelti og stoytkoddar í bilarnar, og tá koyrdi eg saman við familju míni eitt kvøldið eftir einum lítlum landsvegi við bara tveimum breytum. Mamma sat undir mær, tá ið ein mótkoyrandi maður við kenning koyrdi inn á okkara breyt og rakti okkum beint frammanífrá.

Eg minnist ikki sjálvur samanbrestin; men tað kemur enn fram í hugan á mær, tann ótta og ta órógv eg kendi, tá ið eg sá, at eg var smurdur inn í blóð úr hvirlinum og niður í iljarnar. Eg gjørdist varur við, at alt hetta blóðið so verri enn so var mítt egna, men hetta var blóð frá mammu. Í tí løtuni, tá ið tær báðar sterku framlyktirnar lýstu inn í eygu hennara, fjaldi hon sum av handahógvi mín lítla kropp við egna kroppi sínum. Tað var kroppur hennara, sum varð slongdur móti instrumentbrettinum, og høvur hennara, sum knústi framrútin. Hon tók stoytin fyri meg. Tað máttu fleiri stórar skurðviðgerðir til, áðrenn mamma kom fyri seg eftir eina slíka viðferð.

Á krossinum tók Jesus stoytin fyri okkum – hann rindaði fyri syndir okkara, og í tí løtuni at vit seta okkara álit á hann, sameinir hansara blóð okkum við Gud. Hugsa um Guds trupulleika. Bíblian sigur: „Tú, sum hevur eygu so rein, at tey ikki tola at horva at tí illa, tú, sum ikki torgar at síggja gremju, hví hyggur tú til hinar trúleysu og tegir, tá ið hin gudleysi týnir tann, sum er rættvísari enn hann?“ Háb. 1,13. Gud loysir

trupulleikan, sum hann hevur av okkum við tað, at hann førir okkum aftur til rætta pláss okkara „í Kristusi", so hannn sær okkum gjøgnum blóð hansara. Guds orð sigur: „Tí at sál likamsins er í blóðinum, og eg havi givið tykkum tað til at nýta á altarinum til tess at veita sáttargerð fyri sálir tykkara, tí blóðið veitir sáttargerð, av tí at sálin er í tí." 3. Mós. 17,11. At veita sátt merkir at sameina tveir partar, sum hava verið sundurskildir. Sum tað er undurfult! Jesusar blóð er tann brúgvin, sum gongur yvir um gjónna og ger okkum til eitt við Gud!

*„... et Ord til Dagen"* - *Effie Campbell* umsetti.

# At skifta um

Tað eru óteljandi dømi í Skriftini um hetta „at skifta um". Jesus biður okkum t.d. um at fyrigeva øðrum, sum Gud fyrigevur okkum. Hann lovar, at Gud vil vera miskunnsamur móti teimum, sum vísa miskunnsemi. Tað mest grundleggjandi í hesum „at skifta um" er í Jesu lyfti, har hann sigur, at um vit vilja geva honum okkara lív, so vil hann geva okkum lív í yvirflóð – tað æviga lívið.

Og hann sigur: „Tað, sum tit hava gjørt móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tað hava tit gjørt móti mær." (Matt. 25,40). Tað vil siga, at Gud vælsignar okkum, tá ið vit lata hann brúka okkum at vælsigna onnur. Hesa grundregluna havi eg møtt aftur og aftur, meðan eg vaks í mínum andaliga lívi.

Eitt annað greitt dømi finna vit í søguni um Job. Hann leið nógv og misti alt. Men skrivað stendur: „Og Harrin vendi lagnu Jobs, tá ið hann hevði biðið fyri vinum sínum. Og alt, sum hann hevði átt, gav Harrin honum tvífalt aftur." Job 42,10. Tá ið Job fer at biðja fyri teimum, sum bara finnast at honum, hendir undrið, hann fekk alt aftur og tað í yvirflóð.

Størsta umbýtið er kortini tað, sum Jesus gjørdi fyri okkum, tá ið hann fór upp á krossin við øllum okkara syndum. „Hann bar sjálvur syndir okkara á likami sínum upp á træið." 1. Pæt. 2,24. Tað var ein tung byrða at fáa at sjabba undir, at skula bera allar heimsins syndir. Og hvat hendi so har á krossinum? Jú: „Hann strikaði út skuldabrævið, sum kom okkum við, og varð skrivað við boðorðunum, tað sum var okkum ímót, og hann beindi fyri tí, við tað at hann negldi tað á krossin." Kol. 2,14 Og

nú var býtt um, vit fingu Jesu reinleika, og hann varð gjørdur svartur av allari heimsins synd: „Tann, sum ikki visti um synd, gjørdi hann til synd okkara vegna, fyri at vit skulu verða Guds rættvísi í honum.“ 2. Kor. 5,21.

Gev Jesusi lív títt. Tað fert tú ongantíð at angra, tað kann eg vissa teg um.

*Effie Campbell* umsetti.

# Gleði

*„Men ávøkstur andans er: kærleiki, gleði…“ Gal. 5,22.*

Onnur fruktin í røðini av andans fruktum er gleði. Ein smágenta segði við mammu sína: „Mamma, eg haldi, at harra Kinsey fer til Himmals hvørt kvøld, tí hann er so glaður hvønn dag!“ Men Bill Kinsey hevði sína egnu frágreiðing: „Gleði er tað flaggið, sum veittrar á hjartaborgini, tá ið Kongurin Jesus býr inni har.“

Eingilin frøddi seg, tá ið hann boðaði: „Óttist ikki, tí sí, eg kunngeri tykkum eini **stór gleðiboð**, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði!“ Luk. 2,10–11.

Í Skriftini verður nógv talað um, at menniskju, sum kendu Gud, høvdu gleði í hjartanum. „Av frelsunnar keldu skulu tit oysa vatn við gleði.“ Jes. 12,3. „Fyri ásjón tíni er fylling av gleði.“ Sálm 16,11. „Stórum eg gleðist í Harranum, um Gud mín fegnast mín sál.“ Jes. 61,10. „Hann skulu tit fegnast um við ósigiligari og dýrmettari gleði.“ 1. Pæt. 1,8.

Her er uppskriftin upp á gleðina: Fyrst tín Frelsari, so næsti tín og so tú sjálvur.

Kristus er trygdin fyri ævigari gleði og lukku.

*Effie Campbell* umsetti.

---

„Vit byggja kirkjur, sum broyta samfelagið,“ siga tey í triðja heiminum. Her í vesturheiminum hevur samfelagið broytt kirkjuna, meir enn kirkjan hevur broytt samfelagið. Hví? Ein av orsøkunum er, at bíbliuboðanin má vera sunn. Ein meinigheit, sum ikki stendur stinn á sannleikans orði – upp á ein virðiligan máta, verður trampað á. Hon missir sína umskaparkraft.

*e.c.*ums.

# Bið … aftur!!

Tá ið Gud vil hava okkurt gjørt, leitar hann, til hann finnur onkran, sum er villigur at gera hansara vilja. Gud sóknast eftir trúfesti. Eftir einum, sum verður standandi á varðhaldi undir trýsti, sum ikki rýmir, er vinglutur ella sjálvglaður, tá ið mótstøðan kemur. Nýggja Testamenti eggjar okkum til at hava Elia profet sum fyrimynd. Jákups bræv sigur, at Elia var maður undir somu korum sum vit og nevnir serliga hansara bønalív. Hann bað, og tað regnaði ikki í trý ár! Hann bað aftur, og himmalin læt seg upp og gav aftur regn yvir landið! Gud lítur á Elia, og Elia leit á Gud. Hann var gudsmaðurin, sum framdi uppgávuna, sum Harrin hevði givið honum. Hann bjóðaði Báals profetum av og førdi fólkið aftur undir lýdni og gudsótta.

Eftir ta ógvisligu uppgerðina á Karmels fjalli, kundi himmalin aftur lata seg upp og geva regn, og Elia boygdi seg til jarðar og bað fyri at loysa landið úr turkinum. Her síggja vit eina týdningarmikla síðu av bønini, og vit verða eggjað at taka okkum lærdóm av hesum. Elia bað og Gud svaraði beinanvegin upp á róp hansara yvir altarið á Karmel; men tá ið hann fer at biðja um regn aftur, síggja vit eina aðra síðu. Profeturin biður meir enn eina ferð. Tænastudrongurin verður sendur avstað at hyggja eftir bønasvarinum, men tá ið hann kemur aftur og má siga, at hann sær einki, so síggja vit ikki ein Elia, sum hugsar, at hann biður skeivt, og at hann ikki hevur hoyrt frá Gudi. Nei, hann biður bara aftur. Aftur fer drongurin at hyggja eftir bønasvarinum, og aftur fær Elia boð um, at har er einki at síggja. Fellur hann í fátt? Nei, hann fer bara aftur at biðja!

Hetta hendir ikki bara eina ferð, men ferð eftir ferð. Men Elia gevst ikki! Hann biður aftur! Og sjeyndu ferð kemur drongurin aftur við góðum tíðindum: Hann sær eitt lítið skýggj, sum kann boða frá regni. Tað stígur upp um sjónarringin. Bønasvarið er komið ígjøgnum. Elia visti, hvat ið Guds vilji var og helt á at biðja, til hann sá bønasvarið.

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 24. jan. | Tekstur: | Matt. 3,3/Jes. 40,3 og<br>Matt. 4,10/5. Mós. 6,13. | bíbliuorð: | Hebr. 13,8. |
| 31. jan. | Tekstur: | Luk. 2,41-52. | bíbliuorð: | Matt. 2,49b. |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74